**Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð.**
**Bygdarráðsfundur tann 22. juni 2015, kl. $19^{00}$.**

**Bygdarráðslimir á fundi:** Pauli T. Petersen, Karl A. Olsen, Durita á Heygum, Herit Magnussen, Hilbert Elisson, Øssur Christiansen og John Zachariassen

**Skrivari:** Maud Poulsen

---

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 140**
Tilmæli frá Teknisku nevnd um vetrarfriðing av Neshaga – Støðutakan til hegnlinju.
J.nr. 01.00.00-G01-2-15

Tekniska nevnd viðgjørdi á fundi tann 17. juni 2015 uppskot frá Neshaga um at vetrarfriða sambært verandi hegnlinju.
Nevndin samtykti ikki at taka undir við uppskotinum hjá Neshaga, men hinvegin at mæla bygdarráðnum til at halda seg til niðaru hegnlinjuna, vísandi til uppskot til friðing av vetrarbiti hjá Neshaga, dagfest 13. februar 2014.

**Viðv. 140**
Tilmælið varð einmælt samtykt.

**Mál 141**
1. viðgerð av eyka fígging til eldraøkið.
Vestmanna Kommuna rindar í ár kr. 54.576,70 pr. borgara 67 ár og eldri, meðan hinar kommunurnar í samstarvinum, Kvívíkar, Eiðis og Sunda Kommunur, rinda kr. 58.663,30 pr. íbúgva 67 ár og eldri. Hetta svarar til, at Vestmanna Kommuna skal gjalda kr. 878.612 avtrat fyri at gjalda tað sama, sum hinar kommunurnar inn í samstarvið.
Hesar kr. 878.612 koma at vanta í, um raksturin av Heimatænastan í VEKS skal hanga saman fíggjarliga, uttan at munandi broytingar verða gjørdar í rakstrinum hjá samstarvinum.
Pauli T. Petersen, borgarstjóri, mælir tískil bygdarráðnum til at játta kr. 878.612 í eyka fígging til eldraøkið.

**Viðv. 141**
Tilmælið varð einmælt samtykt.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 21.00

Sign.:

Pauli T. Petersen Karl A. Olsen Hilbert Elisson Herit Magnussen

Øssur Christiansen Durita á Heygum John Zachariassen